Við Homer á Stóru Dímun

Tey flestu, sum høvdu sett sær fyri at sigla í kjalarvørri Odysseus, høvdu óivað stevnt beina leið í Grikska Hav.

Men tað hevði italski kjarnorkualisfrøðingurin Felice Vinci ikki gjørt.

Hann hevði lagt leiðina norður í kaldari høv og á ferðini hevði hann lagt at landi í Stóru Dímun, tí tað var á Stóru Dímun, at kendi sjófararin Odysseus sat fangi í sjey ár.

Hjonskvæðið, og Odysseusarkvæðið, stórfingnu hetjukvæðini hjá forngrikska skaldinum Homer um bardagan við Troja og um heimferðina hjá konginum, stríðsmanninum og sjófararanum Odysseusi, eru klassikarar í alheims bókmentum.

Ella sum søguprofessarin Hans Jacob Debes plagdi taka til í tímunum í fornaldarfrøði í Hoydølum:

„Tað „høyrir við til alment dannilsi" at kenna tey.

Tey allarflestu hava í øldir gingið í teirri lukkuligu trúgv, at tað var sjálvandi í Grikska Havi, at Odysseus gjørdi sína drúgu, strævnu heimferð úr Troja.

Nú hevur italski kjarnorku alisfrøðingurin Felice Vinci fullkomiliga endavent hesari uppfatan.

Í ramasta álvara sigur hann seg hava funnið prógv fyri, at tað var í norðurhøvum, at Odysseus ferðaðist.

Bók hansara „Omero nel Baltica" - Homer í Eystrasalti, hevur vakt mill„n ans.

Í hesi bók skrivar italski vísindamaðurin, sum altíð hevur havt áhuga fyri grikskari gudalæru, at hann styðjar seg m.a. til handrit eftir grikska rithøvundan Plutark (ár 46-120).

Plutark skrivaði, at oyggin Ogygie, har dísin Kalypso helt Odysseus fanga í sjey ár, var „fimm dagsferðir við skipi úr Britannia".

Tí kann talan als ikki verða um nakra av griksku oyggjunununum, heldur Felice Vinci.

Talan kann bara verða um eitt pláss: Føroyar.

Felice Vinci fann síðani útav, at á Stóru Dímun er eitt fjall, ið nevnist Høgoyggj, og tað minnir um navnið á oynni hjá Kalypso, sum æt Ogygie.

Nú varð áhugi hansara vaktur av álvara og meiri hann granskaði, fleiri staðarnøvn fann hann her um okkara leiðir, sum minna um nøvnini í Odysseusarkvæðnum.

Italski Homer-serfrøðingurin leggur eisini dent á, at tað er næstan altíð illfýsið veður í kvæðunum hjá Homer: Nógvur mjørki, tað regnar og kavar og tað er næstan altíð kalt og nógvur vindur.

Uttan himpr høvdu allir føroyingar skrivað undir uppá, at teir eru samdir við italiumannin í, at henda lýsingin av veðurlagnum passar nógv betur til norðurlond enn til oyggjarnar í Grikska Havi.

3200 ár aftur í tíðina

Men lat okkum so skrúva tíðina 3200 ár aftur og seta kós ímóti Troja, sum Felice Vinci sigur er bygdin Tolja, vestan fyri finska høvuðstaðin Helsinki.

Eins og viðgitna Troja í gudalæruni, liggur Tolja í einum dali við tveimum ám og fjøllum rundanum.

Tað er slætt heilt oman í mølina

Troja er fallið og hermenninir skulu heim. Her byrjar 10 ára langa, hættisliga ferð Odysseusar heim til til Ithaka og elskaðu konu sína, Penelope.

Fyrst koma Odysseus og menn hansara í bardaga við Kikonararnar, og nógvir teirra fella.

Felice Vinci heldur, at kikonararnir búðu beint við finsku bygdina Kiikoinen.

Tað eydnaðist Odysseusi og hansara monnum at flyggja, men sunnan fyri Maleia, sum Felice Vinci sigur er Malmø, kemur herviligt óveður á teir og í tíggju dagar reka teir á havinuum, til teir koma til landið hjá Lotus-átarunum.

Italski vísindamaðurin fann einki navn á kortinum, sum sipaði til hetta fólkaslagið, ið livdi av træfrukt, men kanska hildu teir til á norsku strondini, heldur hann. Kanska beint við Lote og Lotsberg 170 kilometrar norðanfyri Bergen.

Síðani gongur ferðin til landið hjá kykloparunum, sum Felice Vinci hevur funnið á norsku strondini, og her hitta Odysseus og menn hansara einoygda kyklopin, risan Polyfen„ sum tveitir teir í eina holu og etir nakrar av monnunun.

Men sjálvandi evdnast tað Odysseusi at gera risan blindan og at flýggja.

Av norsku strondini gongur leiðin til Hetlands, har hann lendir í oynni, vindgudurin Aiolos býr á.

Har er óførur blíðskapur og tá ið Odysseus biðjur farvæl, gevur Aiolos honum ein skinnposa at hava við sær. Í skinnposanum eru allir vindarnir, uttan undanvindurin, sum skal føra teir heim. Men forvitni vann á monnum Odysseusar og tá ið teir høvdu siglt í 10 dagar, fullu teir fyri freistingini og lótu posan upp so allir vindarnir sluppu úr honum.

Teir róku aftur til oynna hjá Aiolos, men hesuferð vildi hann ikki hjálpa teimum.

Síðani verður aftur stevnt ímóti Noregi til Telepylos, fjallastaður Lamos í landinum„ har risarnir Laistrygonararnir búðu.

Italski granskarin sigur, at hetta var beint við Tosenfjørðin, tætt við Lamoy.

Eisini her lúrur stórur vandi. Laistrygonararnir tveita stórt grót eftir skipunum hjá Odysseus.

Nógvir mans doyggja og 11 av teimum 12 skipunum søkka.

Næsti steðgur er á oynni Aiaia hjá kellingini Kirke.

Felice Vinci sigur, at Aiaia er Jan Mayen.

Kirke gandar menninirnar til dýr, men Odysseus noyðir hana at taka gandin aftur og eitt ár seinni, letur hon teir sleppa avstað aftur.

Men áðrenn skulu teir framvið hjá gamla vísmannnum Teiresias í deyðaríkinum Hades, sum skal vera á russisku Hvítahavsstrondina.

Frá Hades verður siglt í ein landsynning til Lofoten í sundið har streymurin Karybdis og ódjórið Skylla gera av við nógvar mans.

Italiumaðurin hevur funnið holuna hjá Skylla Helseggenfjall.

Áðrenn tey fara frá Kirke, ávarar hon Odysseus og menn hansara ímóti sirenunum og teirra lokkandi sangi. Sirenurnar eru uttanfyri norsku strondina ímillum Egersund og Flekkefjord.

Sjey ár í Stóru Dímun

Sunnanfyri Lofoten er oyggin Vaeroy.

Sambært Felice Vinci er tað Thrinakia, oyggin, har sólgudurin Heilos búði.

Har Komu Odysseus og menn hansara á land og teir drupu nakrar av heilagu oksum Heliosar. Afturfyri letur Zeus teir ganga burtur, tá ið teir fara av oynni aftur.

Bara Odysseus bjargar sær á land á oynni Ogygie, Stóru Dímun, har hárfagra dísin, Kalypso, býr.



Á Stóru Dímun er Odysseus fangi í sjey ár, áðrenn hon letur hann sleppa eftir boðum frá gudum.

Nú gongur leiðin einaferð enn ímóti Noregi.

Tá ið Odysseus hevur verið á sjónum í 18 dagar, letur Poseidon hann ganga burtur.

Og tá ið hann hevur svomið í tvey samdøgur, kemur hann á land í Sheria, har faiakerararnir búgva.

Tað er ein ómild hellustrond, sum Vinci hevur funnið ímillum Stavanger go Kristiansand.

Teir taka væl ímóti gestinum og Odysseus greiðir Alkinoos kongi frá longu og strævnu heimferð síni.

Kongurin ber so í bandi, at Odysseus loksins sleppur heim til Ithaka.

Og Ithaka, tað er danska oyggin Lyo, sigur italski granskarin.

Oyggin er tann vestasta í oyggjabólkinum, sum Langeland (Dulicho hjá Homer), Ærø (Same) og Tásinge (Zachinto) eru í, og tað passar nágreiniliga til lýsingina hjá Homer í Odysseusarkvæðnum.

Tað eydnaðist hinvegin ongantíð at táa Ithaka at passa til nakra oyggj í Miðjarðarhavi.

Felice Vinci hevur verið á Lyo og tá gjørdust honum greitt, at landsslagið líkist landsslagnumí Ithaka, soleiðis sum Homer lýsir tað.

